# Í hernað ímóti doping

**Nýggja og stranga dopinglógin, sum varð samtykt í desember 2004, verður nú uppfylgd. Mikudagin fer landsstýrismaðurin á fund við ymiskar partar, ið hava við dopingmál at gera**

DOPINGLÓGIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Lògin er bara fyrsti partur av at bremsa dopingútbreiðsluni í Føroyum. Hon setur forboð ímóti at produsera, innflyta, selja og býta út dopandi evni. Men hendan lógin rakar bara bakmenninar – ikki brúkaran, og tí fara vit at gera nógv arbeiði við at fylgja lógini upp, sigur Hans Pauli Strøm, landstýrismaður í almanna– og heilsumálum.

### Doping ikki góðtikið

– Fólk skulu merkja, at dopingmisnýtsla ikki verður tolererað í Føroyum. Tað skal verða stemplað sum nakað ódámligt, sum ikki verður góðtikið. Hóast lógin ikki revsar tey, ið nýta evnini, so skulu misnýtararnir fáa eina kollektiva revsing, við tað, at tey ikki verða góðtikin sum ítróttarfólk, staðfestir Hans Pauli Strøm.



*Hans Pauli Strøm ynskir nú at koma dopingini til lívs. Sum framhald av lógini, er hann nú farin undir fyribyrgjandi og upplýsandi arbeiði ímóti doping*

Fyrsta átakið í uppfylgingararbeiðnum av lógini verður mikudagin, tá landsstýrismaðurin hevur bjóðað ymiskum fólkum til fundar. Kritikarar av lógini, fólk, ið hava læknaførleika innan dopingmál og fólk innan føroyska dopingeftirlitið eru boðin við á fundin.

– Vit fara at diskutera hvat kann gerast fyri at røkka so langt út um lógina sum gjørligt. Lógin snýr seg jú bert um tey, ið breiða dopingina út, men vit ásanna, at tað hevur týdning at røkka misnýtarunum eisini, sigur landsstýrismaðurin.

Hann sigur, at hesin fyrsti fundurin fer at leggja grund fyri víðari arbeiðnum við dopingmálinum.

– Vit ynskja at fáa eina samrøðu í lag ímillum ítróttarfólk, feløg og fólk, ið hava venjingarmiðstøðir, og saman við teimum finna eina loysn á doipingtrupulleikanum, greiðir Hans Pauli frá.

Hann sigur, at á hesum fyrsta fundinum fara tey at royna at kortleggja nøkur ting. Tey fara at tosa um hvat kann gerast og hvørji tiltøk kunnu setast í verk ímóti dopingini.

### Vindur uppá seg

Spurdur um hann hevur nøkur tøl, ið staðfesta dopingtrupulleikan, svarar Hans Pauli Strøm, at tað er sera torført at staðfesta júst hvussu stórur trupulleikin er.

– Tað er møguligt, at man kundi sett onkra kanning í verk, men vit meta, at okkara besti møguleiki er at fáa fólkini í føroyska ítróttarheiminum og fólkini, ið reka venjingarmiðstøðirnar at samstarva við okkum.

Hans Pauli heldur nevniliga, at tey fólkini, ið dagliga arbeiða í útsetta umhvørvinum, hava bestu fortreytir at úttala seg um málið, og eisini bestan møguleika at ávirka.

– Kritikarar av lógini siga, at dopingtrupulleikin er stórur í Føroyum. Størsti trupulleikin er kanska á venjingarmiðstøðunum, har tað snýr seg meira um at byggja kroppin upp enn um ítróttarlig avrik. So vit vita, at dopingfyribrigdið er útbreitt í Føroyum. Vit vita eisini, at trupulleikin vindur meiri og meiri uppá seg, staðfestir Hans Pauli Strøm.

Hann sigur víðari, at tað nokk neyvan fer at lata seg gera at útrudda tað heilt, men at teir av álvara ætla at tálma nýtsluni.

### Fyribyrging

Í ÍSF er ein sonevnd dopingnevnd, sum hevur ásett ávísar revsireglur. Men nevndin hevur ongan møguleika at kanna øll ítróttarfólkini í Føroyum. Tí metir Hans Pali tað vera av størsta týdningi, at fyribyrgjandi arbeiðið ímóti doping verður raðfest.

– Vit eru greiðir um, at tað er lítið at gera við tey, sum longu eru misnýtarar. Tað, sum vit tí serliga skulu leggja okkara orku í, eru tey, sum enn ikki eru byrjað at dopa seg. Við samstarvið við ítróttarfeløgini, venjingarmiðstøðirnar og kanska skúlarnar, kunnu vit gera eitt stórt upplýsandi og fyribyrgjandi arbeiði, sigur Hans Pauli.

Hann leggur afturat, at júst hvat verður gjørt víðari, fer at verða avgjørt eftir fyrsta fundin, sum verður mikudagin.

# Eingin positiv roynd í 4 ár

**Ísf hevur síðani 2002 tikið nakrar og tjúgu royndir árliga av limum sínum. Enn hevur tó eingin roynd verið positiv, men ítróttarsambandið hevur leingi havt ynski um, at fáa heimild at taka royndir av vøddavenjarum eisini**

DOPING
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

– Síðani 2002 hava vit árliga tikið doping royndir av limum okkara. 2/3 av royndunum verða tiknar undir venjing, meðan 1/3 verður tikin undir kapping, greiðir sofur Johannensen, formaður í dopingnevndini hjá ÍSF frá.

Hann sigur at tað verður tilvildarliga valt út, hvør skal testast, men tað verður býtt ímillum



*Sofus Johannsen, formaður fyri dopingnevndini í ítróttarsambandið Føroya, sigur seg ynskja, at teir í framtíðini eisini fara at sleppa inn á venjingarmiðstøðirnar at taka dopingroyndir*

ítróttargreinarnar. Eisini verður hædd tikin fyri, at taka royndir av bæði monnum og kvinnum. Verður ein íðkari tikin fyri doping, verður hann útihýstur frá øllum feløgunum í ÍSF í 2 ár. Bæði frá venjing og kapping.

– Vit hava onga positiva roynd havt enn. Aðrastaðni liggur positiva talið á umleið 1%, greiðir Sofus Johannsen frá.

–Hann staðfestir tí, at trupulleikin tí ikki er so stórur generelt í Føroyum.

Forfengiligheits-doping

Sofus sigur, at teir hava varhugan av, størsti trupulleikin innan doping í Føroyum er innan vøddavenjing.

– Vit hava teir, ið gjarna vilja verða stórir og flottir, uttan at venja nakað serligt. Tí taka teir dopandi evni, fyri at vøddarnir skulu vaksa skjótari. Men vit hava ikki heimild at taka royndir inni á venjingarmiðstøðum, staðfestir Sofus.

Hann sigur víðari, at teir fegnir høvdu viljað fingið eitt samstarv í lag við venjingarcentrini, soleiðis, at teir, sum eina tænastu, kundu komið inn av og á, og tikið doping royndir.

Um venjingarmiðstøðirnar halda tað vera eitt gott hugskot, kundu tær gjørt øllum limunum greitt, at dopingroyndir verða tiknar av og á, og at eingin hevur loyvi at siga nei, um tey verða biðin um at taka royndina. Tey kundu á sama hátt sum vit havt eina innanhýsis sektarskipan, soleiðis, at tey, ið verða funnin positiv, verða útihýst í 2 ár. Tað hevði kanska komið dopingini heilt til lívs, heldur Sofus Johannesen at enda.

## Upplýsingin stóran týdning

**Elsa Maria Bærentsen sum fyri kortum lat venjingarmiðstøðina Yndi upp, sigur seg vera fúsa at hjálpa til í arbeiðnum ímóti doping, har serliga upplýsingin er týdningarmikil**

DOPING
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Elsa Maria Bærentsen, eigari av nýggju venjingarmiðstøðini Yndi, heldur ikki, at dopingtrupulleikin er sjónligur í Føroyum.

– Nú havi eg kort síðani latið eitt venjingarcentur upp, men eg havi ikki lagt merki til nakra dopingmisnýtslu. Eg eri greið yvir, at tað var ein trupulleiki í 80'unum, tá serliga menn, ið vandu vøddarnar, brádliga vuksu sera nógv. Men eg haldi, at dopingin hoyrdi 80'unum til, tí eg havi so ikki merkt nakað til hana nú, sigur hon.

Elsa Maria hevur í fleiri ár eisini verið virkin innan fimleikin í Føroyum, men heldur ikki har sigur hon seg hava sæð nakað til dopingmisnýtlu.

Hon heldur eina av orsøkunum vera, at fólk í dag eru sera upplýst.

– Fólk vita, at doping evnini eru skaðilig, og tí verða tey ikki nýtt, heldur hon.

Ein orsøk kann eisini vera, at dopingin serliga verður nýtt, tá ið vøddavenjarar eru við í kappingum, men í Føroyum er ógvuliga avmarkað hvussu nógvar kappingar eru í vøddavenjing.

### Vil fegin hjálpa

Spurd um hon hon hevði farið á fund við landsstýrismanninum, um hon varð biðin, hóast hon ikki hevur sæð nakað til dopingmisnýtslu í langa tíð, svarar hon, at tað hevði hon fegin viljað.

– Ja, sjálvandi hevði eg tað. Tí fyribyrgjandi og upplýsandi arbeiði kann altíð gerast. Tað koma jú nýggj og ung fólk til allatíðina, og teimum tørvar eisini at fáa at vita, at dopingin er skaðilig. Upplýsingin má fylgja við, sum tey ungu koma til, so eg hevði fegin viljað verið við, varð eg spurd, svarar Elsa Maria Bærentsen at enda.